# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Gaza og føroyingar

Hvat hugsa vit føroyingar um seinastu hendingarnar í Gaza og hvussu ávirkar hetta ræðuliga kríggj okkum? Vit hava vant okkum til at meta Ísrael sum eitt nútímans fólkaræði, ið er grundað á fólkaræðiligar meginreglur við virðing fyri mannarættindum. Seinastu hendingarnar við eitt loftalopum á Gaza bý og innrás í Gazageiran hava skakað hesa føroysku myndina av demokratiska statinum Ísrael. Hetta skal als ikki skiljast sum, at vit sera spurnartekin við tilverurætt Ísraels og rætt Ísraels at verja seg. Men mong munnu nú vera farin at seta spurnartekin við hernaðarligu framferðina hjá Ísrael í Gaza. Orsøkirnar, rakettálopini, kenna vit, men kunnu hesar orsøkir veruliga rættvísgera eitt so ógvusligt álop við so stórum sorgarleiki í kjalarvørri?

Sum partur av alheimssamfelagnum fáa vit føroyingar allar hendingar beint inn í stovuna. Sterk stendur myndin av norska læknanum Mads Gilbert, sum undir allari herferðini hevur arbeitt á størsta sjúkrahúsinum í Gaza. Læknin greiddi í BBC sakliga frá, hvussu sivilfólkið, serstakliga børnini, gerst offur fyri nýggjum og ræðuligum vápnum, ið kunnu tykjast beinleiðis vera ætlað at skaða sivilfólkið. Vit mugu taka undir við komandi amerikanska forsetanum, sum øtast yvir neyðina og segði tað vera hjartanemandi at síggja, hvussu kríggið rakar børnini.

Humanitera støðan í Gaza geiranum má sum vera man elva til sjálvsrannsakan og til nógvar spurningar, sum fólk í Føroyum vanliga ikki seta, tá tey hugsa um Miðaeystur. Um vikuskiftið fingu vit eina hóming av støðu føroyinga. Vit hugsa um orðaskiftið í Rás 2 millum Høgna Hoydal, John Johannesen og Óla Breckmann. Orðaskiftið var hvast, og partarnir kundu valla staðið longur frá hvørjum øðrum. Mong mundu øtast yvir støðuna hjá fólkafloksmanninum, sum enn einaferð avdúkaði, hvussu tann sera høgravendi politikkarin sær heimin í svørtum og hvítum. Hinir báðir høvdu eina meira javnvegaða støðu og høvdu eina greiða fatan av stríðnum og av tí, sum skal til, um hesin sorgarleikur skal verða steðgaður. Tann fjórði luttakarin, Herbert Pundik, lýsti hvussu Ísrael hevði ligið sjóvarfallið av sær við ikki meðan tíð var at gera avtalur við teir moderatu palestinararnar. Nú var ov seint og hann var ikki bjartskygdur um framtíðina.

Leygardagin skipaðu nøkur ungfólk fyri friðartiltaki í Tórshavn. Hóast ódnarveður var fitt av fólki komið saman til gonguna, sum fór úr Gundadali oman í Mettustovu, har røður og tónleikur vóru á skránni. Hetta tiltak er alla æru vert og vísir, at sorgarleikurin nemur við hjørtu okkara. Næstu dagarnir fara at vísa, hvørt friðartingingarnar í Cairo bera úrslit ella hvørt sorgarleikurin stendur við. Latið okkum øll stuðla Reyða Krossi, ið er í fremstu røð á vígvøllinum.

**Sosialurin**

## Nei, tín partur liggur ikki eftir, Annita



JÓANNES EIDESGAARD
landsstýrismaður

Annita á Fríðriksmørk, løgtingskvinna hevur grein í bløðunum nú um dagarnar, har hon partvís viðger mína grein um nýggjársleitið um føroyska búskapin og neyðug stig at taka. Men harumframt gevur hon eisini síni boð upp á tað, sum hon metir vera skilagóð tiltøk at fremja. Og tað, at hava boð um loysnir, er ikki tað, vit vanliga síggja í almenna kjakinum.

Av gomlum vana leggur Annita tó út við at speireka meg eitt sindur sum mannin, sum bert kann gera nakað til nyttu, tá tað brýtur í bæði borð. Hetta sigur hon, tí eg í míni grein staðfesti, at tá tíðirnar ikki eru til vildar, tá er ofta lættari at koma ígjøgnum við størri og truplari avgerðum, enn tá alt rekur við. Men hetta er bara so. Tá afturgongd er í búskapinum er ofta størri forstáilsi fyri truplum loysnum. Tá tíðirnar eru góðar, so tykist alt knappliga at kunna bíða.

Men sjálvandi skulu vit stýra í bæði góðum sum minni góðum tíðum. Gamalt er at siga, at tað ivaleyst er munin truplari at stýra í góðum heldur enn í ringum tíðum.

Eg royndi í míni grein at lýsa, at tað mangan er truplast at fáa politikarar at síggja, tá vandi er á ferð, og at okkurt má gerast. Hetta sóu við sera týðiliga í kreppuni í 90árunum, har politikararnir vóru millum tey seinastu at fáa eyguni á kreppuna. Men tað var kanska eisini tí, at tað var ikki so lætt at koma við boðum upp á loysnir.

Tað er rætt, sum Annita sigur, at sjálv fíggjarlógarviðgerðin ikki bar so nógv brá av, at landsstýrið hevði eina lidna ætlan um tiltøk í mun til búskaparstøðuna og strukturella hallið. Men stundir vóru ikki til tað. Hin vegin so legði landsstýrið orku í at tálma stóra útreiðsluvøkstrinum. Eg haldi ikki, at eg í hesi grein fari at siga so nógv um viðgerðina av fíggjarlógini í fíggjarnevndini, tí tað fara vit at venda aftur til so ella so.

Men vit arbeiða hvønn dag við hesum áðurnevndu spurningum. Tað er einki sum forðar okkum í at seta tiltøk í verk í einum fíggjárári, um hesi bøta um endaliga úrslitið av almenna rakstrinum. Hugskotini úti hjá okkum á Argjum eru mong, men ikki Annitu at siga, tann stóri spurningurin er ikki hvørji uppskot liggja á borðinum, men hvat undirtøka fæst fyri. Politisk undirtøka er fortreytin fyri, at málini verða loyst.

Annars hevur Annita eina røð av uppskotum, sum eru tikin frá hennara parti av álitinum til fíggjarlógina. Eg taki hattin av fyri tær Annita, at tú hevði so mikið av dirvi, at tú setti tey fram, tí øll eru sanniliga ikki so populer. Hin vegin, so er tað nú einaferð so lætt at seta uppskot fram, tá ein situr í andstøðu, tí uppskotini ikki skulu hava undirtøku frá øðrum enn frá eins egna flokki.

Persónliga taki eg undir við fleiri av tínum uppskotum. Fleiri av tínum uppskotum eru eisini við á tí lista av møguligum tiltøkum, sum eg gangi runt við og royni at sannføra mínar samgongufelagar um. Tað verður vónandi so, at tá tey koma fyri ein dag í løgtinginum, so stendur tú har Annita og stuðlar teimum.

Annars takk fyri tínar viðmerkingar og gott nýggjár.

## Samhaldsfesti er trygdin í búskaparkreppuni

**Tíðindaskriv**

Ting- og landsstýrismanning Javnaðarfloksins hevur hesa vikuna viðgjørt fleiri týðandi politisk evnir og framtíðar avbjóðingar í samfelagnum, nú búskaparkreppa rakar. Javnaðarflokkurin er sannførdur um, at besta trygdin er økt samhaldsfesti.

Tí eru millum onnur hesi evni viðgjørd:

Samhaldsføst fígging av vælferðarsamfelagnum, har allir partar skulu vera við til at fíggja felags vælferðina.

Pensjónsreformurin, har eitt endamál er ein samhaldsføst skipan, ið veitir teimum uttan aðrar inntøkur hægri veiting.

Fiskivinnureformur, har framleiðsluvirðið má økjast, og tilfeingisvirðini verða umsitin av einum fiskidagabanka.

Kommunureformur, har dentur verður lagdur á útjavning og málsøki, ið skulu leggjast út til kommunurnar.

Miðvís ætlan fyri, hvussu vit leggja um til grøna og varandi orku.

Um vikuskiftið hevur ting- og landsstýrismanningin viðgjørt ætlanirnar saman við starvsnevnd floksins. Í næstum verður politisku arbeiðsskjølini send til valfeløg floksins kring landið og verða síðani so við og við almannakunngjørd.

**Javnaðarflokkurin**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.